dystir, sum allir »hava nakað uppá seg«, heldur enn 28 dystir, har í mesta lagi 22 veruliga eru dystir, har leikararnir veruliga skulu prógva nakað. Hetta, tí størsti parturin av bólkaspælinum í steypakappingini mest var átøkur venjingardystum. Og har tað hartil í teimum báðum seinastu av hesum ofta varð spekulera í gulum kortum og eftirfylgjandi leikbannum.

Kann væl vera, at hetta gav venjarum kring landið øktan møguleika at royna ymsar liðsamansetingar, og til at geva óroyndum leikarum spælitíð, men teir møguleikarnir verða eisini til staðar í nýggju skipanini. Ikki minst tí økta talið av krevjandi dystum fer at seta størri krøv til hópin, og tí óroyndir leikarar tá av sær sjálvum mugu savna sær nakrar royndir. Einasti hátturin at fáa hesar, er sum kunnugt við at spæla dystir!

Hartil er skipanin við leikbannum eisini ajourførd, soleiðis at hon ikki rakar óneyðuga hart, tá komið verður móti kappingarenda. Tann broytingin var neyðug, og tað ásannaði kappingarnevndin.

Og eisini hjá smærru feløgunum hevur broytta skipanin sínar avgjørdu fyrimunir. Fyri flestu fótbóltsleikarar er galdandi, at teir venja fyri at spæla dystir og ikki øvut. Tey feløg, sum ikki koma langt í steypakappingini, fáa við nýggju skipanini størstu økingina í dystartali, og tað átti alt annað líka gjørt tað meira hugaligt hjá spælarum at spælt við hesum feløgum.

Við øðrum orðum fáa fleiri leikarar fleiri dystir, og tað kann so ikki vera serliga oyðileggjandi fyri føroyskan fótbólt.

## Broyttar venjingar

Sjálvandi viðføra fleiri dystir, at krøvini til hvíld verða økt, og at venjingarnar tí ikki verða eins nógvar. Nakað sum kann skerja møguleikan hjá venjarunum at »forma« liðið. Og tað hevur eisini verið peikað á sum ein negativ avleiðing av broyttu skipanini.

Men tað nýtist tað ikki at gera. Sum er, verður lutfalsliga stórur partur av venjingartíðini hjá liðum nýtt til fysiska partin, og tað átti ikki at verið neyðugt. Tvørturímóti kann ein umlegging av venjingum - og harvið eisini tankagongd hjá venjarunum - flyta fokusið í enn størri mun á teknisku og taktisku dygdirnar av spælinum.

## Heyst/Vár

Meðan omanfyristandandi spurningar soleiðis í flestu førum tykjast venda báðar vegir, so er tó lítil ivi um, at spurningurin um at koppa kappingini, sum Petur Simonsen í sínum íkasti til kjakið nam við, at kalla bara vendir annan vegin.

Her snýr tað seg nevnliga um at koppa kappingini á, soleiðis at tað framyvir kundi verið leikt heyst- og summarhálvur, og ikki tað øvuta, soleiðis sum tað nú er galdandi. Tað vildi so viðført, at økta dystartalið ikki vildi sligið ígjøgnum fyrr enn eftir kappingarbyrjan í august 2006, men tað vildi sum so heldur ikki verið nøkur vanlukka.

Fyri tað fyrsta, so er hetta skipanin, sum nærum restin av fótbólts-europa nýtir. Ikki minst UEFA. Og tí vildi hetta í nógv størri mun sampakkað við luttøkuna hjá føroyskum liðum í europeiskum høpi. Eitt nú var B68-liðið, sum á sumri 2005 fekk av at vita í UEFA-Cup so langt ífrá sama liðið, sum á heysti 2004 vann sær rættin til luttøkuna.

## Bara fyrimunir

Men kanska týdningarmest, so vildi ein slík kapping sampakkað nakað nógv betri við føroyska veðurlagið, um ynski veruliga er at økja dystartalið.

Fyrst og fremst, so kann talan væl gerast um støður, sum nærum verða ítróttarliga óforsvarligar. Sjálvandi skulu øll lið hittast tríggjar ferðir, og tí eru kanska allir dystir av eins stórum týdningi. Men tað skerst ikki burtur, at tað er í seinastu umførunum, har nervin og spenningurin aloftast er í hæddini, at stríð um heiðursmerki og niðurflyting verður avgjørt. At hugsa sær, at ein hvirla í kolandi landsynningi kann verða avgerandi fyri, hvar milliónin frá UEFA skal enda, er alt annað enn hugaligt. Og verður talan um slíkt ódnarveður, at heilt umfar verður avlýst. Nær skulu dystirnir so spælast. Í november??

Her vildi ein heyst/vár kapping verið munandi lættari at umsiti. Er neyðugt at útseta dyst(ir) seinast í oktober, kunnu hesir altíð avgreiðast, tá tað fer at vára.

Hartil vildi tað helst eisini verið munandi meira hugaligt fyri bæði leikarar og áskoðarar, um veruligi endaspurturin kundi farið fram í fagrasta vár- og summarveðrið. Steypafinalan kundi hóskandi verið leikt um hvítusunnu, og so høvdu liðini eftir ein stuttan – men kortini reellan - summarsteðg als ikki havt sama tørv á eini harðari grundvenjing undan kappingarbyrjan. Hon vildi so sjálvandi komið um várið, men her vildi tað so verið fyrimunurin, um kappingarárið er longt nakað, soleiðis at konditionella støðið hjá leikarunum ikki fer eins langt niður, sum tað hevur verið vanligt.

Motivatiónsfaktorurin vildi helst eisini fingið eitt kvink rætta vegin. Sum er, er tað ein stórur trupulleiki hjá fleiri feløgum, at leikarar at kalla ikki tíma at spæla fótbólt seinastu dystirnar. Hjá nógvum liðum er lítið og einki at spæla um, og tí kann vera ilt at motivera menn til venjingar í kavaslettingini, oysandi regni og kolandi stormi. Sjálvandi vil broytta kappingin ikki økja spenningin, men tað er hóast alt lættari at spæla týdningarleysar dystir í góðum veðri!

Og at enda, so kundi tað við hesum borið til at komprimera kappingina nakað. Talan kundi verið um ein veruligan summarsteðg, har leikarar kanska høvdu møguleika at ferðast við familjuni. Tann møguleikan fáa teir ikki nú, tí við bara tveimum dystarfríum vikuskiftum, er lítil meining í at senda menn í summarfrí.

## Landsliðið

Og at enda, so vildi ein broytt skipan eisini verið ein fyrimunur fyri landsliðið. Gamla skipanin hevði sum størsta veikleika, at seinasta landsliðsterminin var eftir seinasta landskappingarumfar. Og tað hevur í nógvum førum víst seg at vera sera óheppið.

Fleiri av spælarunum hava tá ofta koblað mentalt úr í fleiri vikur, og tí er trupult at geara menninar til krevjandi landsliðsuppgávur. At flestu feløgini so eisini halda rimmar veitslu eftir seinasta umfarið, betrar ikki um støðuna í so máta.

Her eigur ein nýggjur kappingarkalendari at verða lagdur soleiðis, at landskappingin bæði um heystið og á vári fer út um landsliðsterminir. Gjarna nokk so langt út um á várið, soleiðis at mentala ferian ikki er farin ígongd, tá landsdystir standa fyri framman.

## Fakta um kappingina

Í 1. deild hjá monnum verða í 2005 leikt 27 umfør.

Fyrstu níggju dystirnir eru skipaðir soleiðis, at tey fimm liðini, sum í fjør endaðu ovast, hava fimm heimadystir. Hini liðini hava tá fýra heimadystir. Seinastu 18 umførini spæla øll liðini móti hvørjum øðrum heima og úti.

Skipanin við leikbannum er broytt soleiðis, at leikari fær leikbann eftir fimm gul kort. Næsta leikbannaið kemur eftir trý gul kort og síðani verður leikari bannaður fyri hvørji tvey gul kort.

## Styttri til brotsspørkini

Tað er eitt grundleggjandi prinsipp í dómaraspurningum, at ivin altíð skal koma áleypandi liðnum til góða.

Hetta prinsipp hevur nú viðført, at danir – og harvið eisini føroyingar – hava gjørt leiðina hjá áleyparum til brotsspark styttri.

Áður hevur tað í øllum førum verið so, at beinleiðis fríspark skal takast á »kontaktstaðnum«. T.v.s. at um verjuleikari byrjar at toga í áleypara, áðrenn hesin er komin inn í brotsteigin, skal beinleiðis fríspark dømast, har verjuleikarin togaði fyrstu ferð. Líkamikið um mótspælarin hevur vunnið seg inn í brotsteigin, áðrenn bríksláð verður.

Í nýggju ásetingunum hjá DBU verður sum ískoyti til regluna um »kontakstaðið« sagt: »Um verjuleikari heldur einum álopsspælara, og kontaktstaðið er uttan fyri brotsteigin, men har brotið heldur fram inn í brotsteigin, skal brotsspark dømast«.

Í viðmerking verður sagt, at tað at halda mótleikara er einasta brotið á fótbóltsreglurnar, sum kann fevna um eitt langt strekki á vøllinum. Og at tað ikki er rætt og rímiligt, at verjuleikarin skal sleppa bíligari, bara tí hann byrjaði at halda uttan fyri brotsteigin.